## Javnaðarflokkurin gongur aftur

Í Vikuskiftis Sosialinum hendi eitt mistak. Talan er um eina grein viðvíkjandi spurnarkanningini, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin. Greinin hevði yvirskriftina: »Gerhard sigrar í Sandoynni.« Men hetta ikki er rætt, tí í veruleikanum gekk Javnaðarflokkurin nógv aftur í øllum landinum og serliga í Sandoynni. Í Sandoynni er tað í veruleikanum so, at Javnaðarflokkurin við Gerhardi Lognberg fór frá at hava eina lítla helvt av atkvøðunum hjá teimum spurdu, til at hava umleið ein fimting. Hinvegin er Fólkaflokkurin veruligi vinnarin í Sandoynni, har hann mestsum tvífaldaði atkvøðurnar sambært kanningini, men havast má eisini í huga, at umleið ein fjórðingur av teimum spurdu í Sandoynni ikki vita, hvønn tey høvdu valt, um val var í dag.



## Fiskiskip í oljuvinnuna sum vaktarskip

Nú stórur partur av fiskiflotanum liggur vegna høgar oljuprísir, hava vágbingar, saman við útlendingum, stovnað felagið Orka Offshore, sum hevur til endamáls at bjóða føroysk skip sum vaktarskip í oljuvinnuni. Í farnu viku segði John Henrik Holm, stjóri í Orka Offshore, við Vinnuvitan, at møguleiki verður hjá føroyskum skipaeigarum at leiga skip við ella uttan manning út gjøgnum Orka Offshore. Bæði Nesborg og Sunbeam eru farin til Danmarkar at gerast klár til oljuvinnuna, nú tey skulu virka sum vaktarskip, skrivar portalurin hjá Suðurrás.

# Sannur kabaretdámur á Sjómannadegnum

**Við sangi, sketsjum og speiksum prikum var Klaksvíkar Sjónleikarafelag veruliga aftur í sinum gamla elementi á Sjómannadegnum við kabarettini Gloymd Grýta**

KABARETT

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Væl fleiri enn túsund fólk løgdu leiðina framvið nýggju brandstøðini Sjómannadagin, har leikarar í Klaksvíkar Sjónleikarafelag undirhildu við kabarettini Gloymd Grýta.

### Upplýsandi og undirhaldandi

Kabarettin byrjaði við eini fínari stummsenu um, tá Klaksvíkin fekk navn. Við eyðkendu, títtu stummfilmarørslunun og hartil hóskandi tónleiki, varð tíðin skrúvað 100 ár aftur á sera sannførandi hátt. Harfrá tóku leikararnir áskoðararnir framvið øllum frá eingilskmannadansi og læknastríði til ørligu 80ini og bankakreppuna.

Seliga í kreppusketsjuni vístu Rudolf Joensen og Jógvan Brim seg sum sannar meistarar, tá tað ræður um kabaretleik.

Eisini hevði ein av býarmyndunum í Klaksvík, John Reid Bjartalíð, fingið gott pláss í kabarettini í eini sera væleydnaðari sketsj, har lokali tíðindamaðurin kunnar Útvarp Føroya um hendingar norðuri í Klaksvík.

Soleiðis vóru allatíðina nýtt ymisk snildi, sum bæði gjørdu kabaretttina upplýsandi, samstundis sum undirhaldið var í hæddini.




*Við kabarettini Gloymd grýta vístu leikarar í klaksvíkar sjónleikarafelag seg enn einaferð sum sannar meistarar innan kabaretleik*



*Fryntligi listamaðurin Livar Nysted fekk sær fegin eitt prát við mongu gestirnar, sum stukku inn á gólvið í egningarskúrinum at hyggja at hansara málningum*

# List í egningarskúrunum

**Ikki færri enn trý lokal listafólk syndu fram í egningarskúrunum á Stangabrúnni Sjómannadagin**

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialirin.fo*

Sjómannadagurin er annað enn fiskur og sjó-mannakappingar. Umframt øll hini tiltøkini bar eisini til at uppliva lokala list í tveimum egningarskúrum.

### Lívið á keiini

Í øðrum skúrinum sat listamaðurin Livar Nysted fekk sær fegin eitt prát við mongu gestirnar, sum stukku inn á gólvið í skúrinum. Á veggunum hingu vælumtóktu hugmyndirnar hjá Livari Nysted, men hesuferð royndi hann seg eisini við myndum við einum meir politiskum sniði.

Í næsta skúrinum hittu vit tær báðar Lydiu Petersen og Jórun Høgnesen. Eyðkendu Klaksvíksmyndirnar hjá Lydiu Petersen prýddu annan veggin, meðan lívið á keiini sett dám á myndirnar hjá Jorun Høgnesen hinumegin.

Til dagsins høvi hevði Jórun Høgnesen eisini tikið eina av sínum fyrstu myndum við, sum ógvuliga hóskandi ímyndar lívið í einum egningarskúri á Stangabrúnni.